# Carl Jóhan 50 ár



Sunnudagin 2. desember fylti Carl Jóhan Jensen rithøvundur í Havn 50 ár.

Carl Jóhan er uppvaksin í Havn, har hann gekk í kommunu- realskúlanum. Í 1973 fór hann til Danmarkar á studentaskúla og tók fornmálsligt studentprógv í 1976 og flutti heima aftur til Føroya.

Heimafturkomin arbeiddi hann sum blaðmaður og gjørdi annað fyrifallandi arbeiði til hann í 1979 fór undir lestur á Føroyamálsdeildini og tók exam. art prógv í norðurlendskum máli í 1981.

Eftir tað fór hann til Íslands at lesa íslendskt mál og almenna bókmentafrøði til 1987.

Síðan gekk leiðin til Australia saman við konuni Kate Sanderson, ið er úr Sidney. Tey vóru har í eitt ár. Eitt tíðarskeið í 90-unum búðu tey í Tromsø í Norðurnorra saman við synunum Eiriki Høgna og Jóhan Fríðrik.

Carl Jóhan tók cand. Pihl prógv í føroyskum í 1990.

Carl Jóhan hevur altíð havt stóran áhuga fyri bókum, og sjálvur hevur hann givið út nógv ymsikt, bæði bøkur og yrkingarsøvn. Umframt at yrkja hevur hann fingist við at týða úr íslendskum, eysturnorðurlendskum og enskum. Hann hevur eisini týtt fleiri leikir til føroyskt.

Hann hevur sitið í nevndini fyri Rithøvundafelag Føroya og í starvsnevndini fyri LISA. Hann er eisini heiðraður við bókmentavirðisløn M. A. Jacobsens.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jóan Hendrik Húsgarð**, ættaður úr Havn, búsitandi í Hjørring andaðist leygardagin, 42 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Sankt Catrinæ kirkju í Hjørring mikudagin klokkan 13:30. Tey, ið vilja minnast Hendrik kunnu lata eina peningagávu til Kamillianergården Hospic í Ålborg, konta 9035, 456.029.1499

**Anna Rigmor Joensen** andaðist í De Gamles By í Keypmannahavn mikudagin, 90 ára gomul. Jarðarferðin verður hósdagin 6. desember kl. 13 úr Vestre Kirkegård, lille kapel.

**Dagurin**

**5. desember. Sabina.** Nógvar halgikvinnur bera hetta navn, men eingin tykist at hava samband við henda dag. Hildið verður tí, at talan er um tann halga mannin Sankta Sabas, ið er kendur kleysturbyggjari í Palestina. Hann doyði umleið ár 532

# Kommunal jagstran av vinnulívi

**Høgni Mikkelsen, býráðslimur í Havn, heldur lítið um handfaringina hjá kommununi av málinum um fýrverkið hjá sp/f Skot, sum varð sett skamt frá goymslu við spreingievni.**

UMSITING

*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



*Handfaringin hjá kommununi av fýrverkmálinum hevur verið út av lagi vánalig, sigur Høgni Mikkelsen, býráðslimur*

*Savnsmynd*

Málið um umstríddu bingjurnar við fýrverki, sum smápartafelagið Skot hevur havt standandi fleiri staðni í býnum, hevur verið uppi og vent í býráðnum. Ella tað vil siga, har var ein roynd gjørd at umrøða málið.

Høgni Mikkelsen, býráðslimur, royndi at fáa lýst málið í fíggjarnevndini hjá Tórshavnar Býráð. 23. november skrivar Høgni Mikkelsen soleiðis til allar býráðslimirnar:

"Í gjár segði borgarstjórin, at hann hevur givið boð um at fýrverki skuldi flytast ongantíð ov skjótt, sum skilst skal tað vera mánadagin. Eg havi skilt at brunaumsjón landsins hevur gjørt eina niðurstøðu, at fýrverki er tryggast har sum tað er, og tí meini eg at tað er óforsvarligt at fara í holt við at flyta tað. At niðurstøðan hjá brunaumsjón landsins ikki verður gingin á møti haldi eg vera óforsvarligt. Tá teir serkønu koma til eina niðurstøðu, kann kommunan ikki gera tað øvugta.

Sum býráðslimur vil eg hava eina frágreiðing um hetta mál áðrenn tað verður sett í verk. Trygdin hjá borgarnum eigur at koma í fremstu røð, tí er Brunaumsjón Landsins komin til hesa niðurstøðu, og tí heiti eg á borgarstjóran um at kalla fíggjarnevndina saman, áðrenn nakað fýrverk verður flutt.

Men tað hendi ongantíð. Høgni Mikkelsen fær bara svar frá einum býráðslimi, nevniliga Jógvan Arge. Sama kvøld skrivar Jógvan Arge soleiðis aftur til Høgna Mikkelsen:

"Eg haldi tú skalt kalla ST-trygdarráðið saman. Tað hevur heldur meira vald enn fíggjarnevndin. Heilsan ja."

### Jagstran

Høgni Mikkelsen lítið um svarið og manglandi seriøsitetin hjá sínum starvsfeløgum í býráðnum. Og hann heldur enn minni um handfaringina hjá býráðnum í hesum máli.

- Her er talan um ungar menn, sum royna at byrja eina fyritøku. Sum kommuna kann man ikki ganga og renna eftir teimum alla tíðina. Hetta minnir mest um jagstran, og tað er skeivt, haldi eg, sigur Høgni Mikkelsen.

Høgni Mikkelsen viðgongur, at sjálvandi er tað altíð eigararnir, sum hava ábyrgdina av, at øll síni viðurskifti eru í lagi.

- Avgjørt. Og tað var eisini eitt mistak, at fýrverkið nakrantíð kom at standa á Hálsi. Men tá fýrverkið seinni bleiv flutt niðan í grótbrotið Undir Varða, og bæði Brunaumsjónin og Arbeiðseftirlitið mettu bingjurnar standa væl har, so átti kommunan ikki at gjørt meira við málið, sigur Høgni Mikkelsen.

- Tað, sum irriterar meg, er, at tá serkunnleikin sigur, at fýrverkið stendur væl í grótbrotinum, hví skal man tá flyta tað niðan á Bøllureyn, spyr Høgni Mikkelsen.

Víðari vísir býráðslimurin á, at avgerðin hjá býráðnum eisini fekk avleiðingar fyri eina aðra, privata fyritøku. Nevniliga P/F Borg, sum var í vanda fyri at missa sítt loyvi til spreingigoymsluna, sum fyritøkan eigur á økinum.

### Ábyrgdarleyst

Høgni Mikkelsen setir spurnartekin við, um fýrverkið stendur væl í bingjum, úti í náttúruni uppi á Bøllureyni.

- Tað hevur verið ført fram, at fýrverkið stendur betri innandura, heldur enn úti. Hvat hendir, um so er at góðskan á fýrverkinum versnar, tí at tað stendur úti? Og at ein ólukka stendst av hesum. Kann kommunan so ábyrgdast, spyr Høgni Mikkelsen.

Sosialurin fylgir við málinum.

Mótljós / Into the Light

## Úrvaldir málningar av Heðin Kambsdal



*Heðin Kambsdal*

Nýggj bók við 63 útvaldum málningum av Heðini Kambsdal er útkomin. Málningarnir eru frá tíðarskeiðinum 1966 til 2007, harav teir flestu eru málaðir eftir ár 2000.

Bókin, sum er á føroyskum og enskum, er 44 blaðsíður og kostar 175 krónur.

Heðin Kambsdal signerar bókina á hesum støðum: Hósdagin 6. desembur 2007, kl. 19.30, Ribarhús, Fuglafjørður, fríggjadagin 7. desembur 2007, kl. 16.00, SMS, Tórshavn, og leygardagin 8. desember 2007, kl. 14.00, Leikalund, Klaksvík.

Sosialurin
www.sosialurin.fo